Susan og Bruce:

# Føroyskir summargestir

**Hetta er árstíðin, tá ið summargestirnir av álvara koma higar. Nógvir av teimum eru eisini av føroyskum uppruna, og hava teir vanliga eina áhugaverda søgu. Fleiri teirra støkka eisini inn á gólvið hjá Sosalinum, so til ber at fáa eitt prát við teir.**



*Susan og Bruce Taylor hava vitjað røturnar hjá henni. Aftanfyri sæst Pæsastova haðani Ove var ættaður.*

SAMRØÐA
*Óli Jacobsen*

Nú um dagarnar vóru tað hjúnini Susan og Bruce Taylor, sum vit hittu. Hon er "peruføroysk", meðan hann er eins nógv kanadiari og er í Føroyum fyrstu ferð.

Upprunin til hesa søgu er, at havnarmaðurin Ove Carlson sum ungur maður í 1952, 32 ára gamal, flutti til Kanada saman við konuni Helenu. Tey vóru tá nýgift. Helenu var Óla og Helenu Toftum úr Vági.

Beinleiðis orsøkin til, at tey fóru, var, at tann eldri beiggi Ova, Evany, var farin til Kanada nøkur ár frammanundan, og var hann komin væl fyri. Tíðirnar vóru ikki so góðar í Føroyum tá, og hetta gjørdi tað jú eyka freistandi.

Ove varð føddur í Tróndargøtu í Havn tann 15. januar 1920. Hann var sonur Victor í Pæsastovu og Margretu (fødd Holm) úr Hvalba. Tey bæði fingu níggju børn, dreingirnar Evany, Carl Andreas, Mortan, Ova og Ivan. Genturnar vóru Gerda, Ella, Maria og Margit. Ove var hin seinasti av systkjunum, sum doyði, og var hetta í juni í fjør. Hann gjørdist 88 ára gamal.

Ove vaks upp í 20- og 30-árunum í lítlu Havnini, sum, undantikið nøkur fá hús úti á traðunum, bara rakk av Abbatrøð til niðastu húsini við Landavegin og av Reyni niðan á Heygsbreyt, nakað niðan Varðagøtu og Tinghúsvegin.

Her búðu eini 2.500 fólk, tætt pakkað saman, og tímiligu umstøðurnar vóru sera trongar.

Fyrsta tímalønin, Ove tjenti sum drongur, var 15 oyru. Seinni fekk hann 32 oyru, men tá var tað bert hendinga dagur, at heilur arbeiðsdagur var at fáa.

### Búsettust í Trail

Tey búsettust í lítla býnum Trail í British Colombia, sum er vestasti statur í Kanada. Hann liggur út móti Kyrrahavinum. Trail er nakrar hundrað kilometur inni í landinum, tað er stutt í Kanada, og 10 kilometur norður frá markinum til USA.

Í Trail búgva um 7.000 fólk. Sum nógva staðni í Kanada eru ymiskar tjóðir, sum búgva saman. Í Trail er fimti hvør íbúgvi etniskur italienari. Tilflytingin av italienarum var fyrst og fremst fyrst í hinari øldini.

4% av íbúgvarunum er upprunafólk, indianarar. Tað er eisini eitt sløð av kinesarum.

Størsta arbeiðsplássið er Teck Cominco, sum er størsta sinkbræðarí av sínum slag í heiminum.

Her er eisini ein stór ferðafólkavinna. Her er heitt um summarið, upp til 35 hitastig, og milt um veturin.

Ta fyrstu tíðina arbeiddi Ove í einum timburhandli hjá beiggjanum Evany.

Tey blivu øll hart rakt, tá ið nakrir limir í einum fundamentalistiskum russiskum trúarbólki í mótstøðu móti framburði og nútíð brendu timburhandilin niður.

Eftir hetta búðu tey eina tíð í lítla býnum Kitimat, norðuri



*Her í Trail bú ði Ove við síni familju*